# Størsta akvarium í Evropa oyðilagt

**Stórfingna Norðsjóvarsavnið í Hirtshals er rættiliga illa farið av stóreldinum týskvøldið. Akvariumið, sum kostaði 95 mio. krónur í 1998, er farið at leka av nógva hitanum, og stórur vandi er fyri, at øll 1000 fiskasløgini fara fyri skeytið**



BRANDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Størsta akvarium í Evropa, Norðsjóvarsavnið, í Hirtshals er illa farið av eldsbruna. Týskvøldið klokkan seks kyknaði eldurin og ikki fyrr enn á midnátt eydnaðist tað sløkkliðsmonnunum úr norðurjútlandi at basa stóreldinum.

Heili trettan sløkkiliðsbilar komu alt fyri eitt á savnið, men stutt eftir klokkan seks týskvøldið var høvuðsbygningurin í ljósum loga, men sløkkisliðmenninir fingu bast eldinum, so hann ikki breiddi seg til hinar bygningarnar.

Mikumorgunin vóru bjargingarfólk framvegis ikki komin inn í bygningin, og tí bar ikki til at siga nágreiniliga, hvussu stórur skaðin á Norðsjóvarsavnið er.

Tað er kortini greitt, at stórur partur av savninum er oyðilagdur av eldinum. Størsta perlan á savninum, akvariumið, er eisini illa farið. Størsta uppgávan í løtuni er at bjarga teimum 4000 fiskunum, sum halda til í størsta akvariuminum í Evropa.

### Ivasamt

Føroyskar keldur í Hirtshals, sum Sosialurin hevur havt samband við, siga, at tað framvegis er rættiliga ivasamt, um tað fer at eydnast at bjarga teimum mongu fiskunum.

Nógvi hitin hevur gjørt, at eitt hol er komið í akvariumið, og tí er óttið fyri, at rúturin ikki fer at halda ímóti stóra vatntrýstinum. Poul H. Pedersen, stjóri á Norðsjóvarsavninum sigur við BT, at hann óttast, at stóra akvariumið ikki fer at halda, og tískil fara tey mongu fiskasløgini í akvariuminum fyri skeytið.

Tað er um 1000 ymisk fiskasløg í akvariuminun, so tað er eitt rættiliga stórt virði, sum fer til spillis, um tað ikki eydnast at bjarga teimum 4000 fiskunum.

Millum fiskasløgini á Norðsjóvarsavninum eru eitt ótal av ymiskum pelagiskum fiskasløgum og ymisk hávasløg.

### Møguliga hondverkarar

Vakthavandi á løgreglustøðini í Hjørring sigur, at stóreldurin í Norðsjóvarsavninum kann verða óbeinleiðis íbirtur av nøkrum hondverkarum, sum arbeiddu í bygninginum seinnapartin týsdagin. Hann vísir til, at hondverkararnir nýttu vinkulslíparar og lakeraðu gólv, og tað kann verða orsøkin til, at eldur kyknaði um seks tíðina týskvøldið.

Borgmeistarin í Hirtshals, Knud Størup, er sum vera man sera harmur um brandin. – Flaggskipið, vit hava bygt seinastu 10 árini liggur í knúsi. Hetta fer at taka fleiri ár at byggja upp aftur, sigur hann við Politikken.

## Fakta

**Fakta um Norðsjóvarsavnið**

- Norðsjóvarsavnið lat upp í januar 1984. Parturin av savninum, sum er brendur, húsar stóra akvariunum. Stórfingna akvariumið lat upp í 1998. Tað kostaði 95 mio. krónur
- Akvariumið rúmar 4,5 mio. litrar av saltvatni og er størsta akvarium í Evropa. Víddin er 22 m. x 33 m. og 8 metrar í djúbd
- Akvariumið er serliga gjørt til vísa fram pelagiskan fisk.-Sild, makrel, hornfisk og rossamakrel. Hesi fiskasløg hava brúk fyri stórari rúmd fyri vísa seg fram.
- Akvariumið hevur eisini vanligastu hávasløgini í Norðsjógvinum. Tindhávur, gráhávur og reyðhávur.
- Áskoðararnir kunnu hyggja eftir fiskunum ígjøgnum ein 6 metur høgan og 12 metur breiðan rút.
- Norðsjóvarsavnið er eitt av mest vitjaðu støðunum í Danmark. Mett verður, at árliga eru millum 270.000-280.000 vitjandi. Higartil hava um 5. mio. fólk verið á Norðsjóvarsavninum til samans.

# Stórt sár á býin

**Fyristøðumaðurin á føroyska samkomuhúsinum í Hirtshals, Poul Jóhan Djurhuus, sigur, at øll í Hirtshals eru sera hørm um eldin á Norðsjóvarsavnið. Hann lýsir hendingina sum eitt stórt sár á allan býin**

BRANDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Virkandi fyristøðumaður á samkomuhúsinum, Malta, í Hirtshals, Poul Jóhan Djurhuus, greiðir frá, at íbúgvararnir í Hirtshals eru tungir í huga av brandinum á Norðsjóvarsavnið týskvøldið.

– Eg koyrdi út og hugdi í gjárkvøldið(týskvøldið, blðm), og har vóru nógv sum grótu. Stemningurin er rættiliga tryktur, tí savnið hevur ómetaligan stóran týdning fyri býin. Eini 300.000 fólk hava vitjað savnið árliga, og tí hevur staðið kastað nógv av sær, og dregur nógv ferðafólk til býin, sigur fyristøðumaðurin á Malta.

Hóast Poul Jóhan Djurhuus hevur ikki búð so leingi í Hirtshals, so er hann líka keddur sum flestu íbúgvararnir í Hirtshals. Hann greiðir frá, at fólk eru sera hørm um hendingina, og brandurin er eitt stórt sár á býin.

Hann leggur tó í sama viðfangið afturat, at ein má hava í huga, at talan er um ein materiellan skaða, sum kann gerast aftur. - Tað hevði verið nógv verri um talan var um fólk, sum vóru í lívsvanda, sigur Poul Jóhan Djurhuus.

### Við abbabørnunum

Fyristøðumaðurin á samkomuhúsinum Malta býr mitt í Hirtshals. Norðsjóvarsavnið liggur ein lítlan minutt við bili frá heiminum hjá Poul Jóhan, so hann hevur havt góðar møguleikar at vitja stásiliga savnið.

– Savnið er ein hin størsta turist attraktíónin í øllum Danmark. Savnið er sera áhugavert og ikki minst barnavinarligt. Eg havi fleiri ferðir verið á savninum við abbabørnunum, síðan eg kom niður at búgva, fortelur Poul Jóhan.

### Nógvir føroyingar

Poul Jóhan Djurhuus metir, at eini 1000 føroyingar búgva í Hirtshals. Hann sigur frá, at nógv størsti parturin arbeiðir innan fiskivinnuna, antin á sjógvi ella landi. Føroyska fyritøkan, Vestlaks, hevur eina deild í Hirtshals, har fleiri føroyingar dagliga starvast.

# Bilar

Nr. 241 • hósdagur • 18. desember 2003 • 77. árg.

Toyota Prius II:

# Hybridbilur við tveimum motorum



*Toyota Prius II við tveimum motorum er ein av heimsins mest framkomnu og umhvørvisvinarligu bilum*

**Ein av heimsins mest framkomnu og umhvørvisvinarligu bilum, Toyota Prius, kemur á danska og føroyska marknaðin í vár. Bilurin hevur tveir samanbygdar motorar, annar bensin og hin eldrivin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast hybridbilurin, Toyota Prius, hevur verið á marknaðinum síðan 1997, er tað fyrst nú, at hann kemur til Danmarkar. Orsøkin er, at danska stjórnin ikki hevur vilja givið hesum umhvørvisvinarliga bilinum avgjaldslætta. Nú hava danir tikið avgerðina um at taka bilin heim og vóna, at danska stjórnin, eins og fleiri stjórnir í Evropa, fer at geva bilinum ans, og at hann sleppur undan ov stórum avgjøldum.

Toyota Prius er ein bilur við tveimum motorum samanbygdum motorum sum supplera hvønn annan. Bensinmotorurin er ein 4 syl. við 115 hk, meðan elmotorurin hevur 68 hk.

Í orðabókini stendur at "hybrid" merkir nakað við at blanda, og ein hybridbilur er ein bilur sum í minsta lagið hevur tveir motorar, sum brúka ymiska drívmegi, sum t.d. Prius sum brúkar bensin og el. Hybridkonseptið virkar soleiðis at bensinmotorurin og el-motorurin supplera hvønn annan og syrgja fyri at bilurin altíð koyrir optimalt, bæði hvat kraft, økonomi og umhvørvisvernd viðvíkur.

Battaríini, sum liggja í dúrkinum, geva streym til el-motorin og verða lødd upp av bensinmotorinum. Fyri at bilurin ikki skal verða ov tungur, er stórur partur av plátulutunum gjørdir úr aluminium.

Prius hevur elektroniskt "start & stop", t.v.s. at tá bilurin stendur stillur, steðgar motorurin og startar aftur, tá bilførarin traðkar á spitaran. Girstongin, er eitt lítið elektroniskt joystick í instrumentborðinum. Bilurin hevur allar tær vanligu elektronisku trygdar- og hjálparskipanirnar, sum eru í nútímans bilum.

Bæði FDM / Motor og Motor-Magasinet hava royndarkoyrt bilin, ið er sera ljóðleysur at koyra, serliga tá hann koyrir við el-motorinum, men eisini við bensinmotorinum.

Toyota er av tí fatan at hybridtøknin er eitt tað mest realistiska boðið uppá ein optimalan umhvørvisvinarligan familjubil. Frá Reyni Service verður sagt, at teir hava tikið avgerð um at taka bilin til Føroyar, samstundis sum hann kemur til Danmarkar.

## Toyota Orius II Hybrid

| | |
|---|---|
| Motorur I: | 1,5 litur 4 syl bensin 78 hk |
| Motorur II: | El-motorur við 68 hk |
| 0-100 km/t: | 10,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 23,0 km/l |
| Stødd og vekt: | |
| Longd: | 445,0 cm |
| Breidd: | 173,0 cm |
| Hædd: | 149,0 cm |
| Eginvekt: | 1300 kg |
| Søluumboð: | Reyni Service |
| | Vegurin Langi |
| | FO-188 Hoyvík |
| | Tel. 353040 |
| | www. reyniservice.fo |



*Toyota Prius II innan. Girstongin er sum eitt joystick*



*Á einum skíggja í miðjuni á instrumentborðinum kann bilførarin og tey ferðandi í bilinum fylgja við hvat hendir í motorrúminum, hvør motorur er í drift o.a.*



*Motorarnir fylla væl í motorrúminum. Á myndini er elmotorurin til vinstru og bensinmotorurin til høgru*



*Bensin- og el-motorurin eru samanbygdir og supplera hvønn annan*